# Varmakeldustevnan verður fjølbroytt

TÍÐINDASKRIV



Í vikuskiftinum verður varmakeldustevna í Fuglafirði. Sjálvt um eingin FM-kappróður er, ætla fyrireikararnir ikki, at stevnan skal verða merkt av hesum. Hvørki so ella so.

Longu mikudagin byrjar stevnan, tá yngru deildirnar leika fótbólt á vøllinum, umframt at ÍF hevur bingo í Stórhúshøll kl. 19.30. Hósdagin er eisini bara fótbóltur í skránni. Allir fótbóltsdystirnir eru steypadystir.

Fríggjadagin kemur so eitt sindur meir av stevnudámi yvir bygdina. Tá letur m.a. tivoli upp á økinum millum Føroya Banka og bókasavnið. Kl. 19.00 letur listaframsýning upp í Gallarí Ribarhúsið. Tað er Rannvá Holm Mortensen, sum sýnir fram. Í sambandi við ferniseringina fríggjakvøldið lesur Jóannes Nielsen upp nýggjar yrkingar, meðan Eyðun Larsen fer at framføra á klaverinum. Kl. 20.00 fara fólk í Sjónleikarafelagnum at framføra varmakelduteiti í nýggja mentanarhúsinum. Kl. 23.30 verður diskotek í mentanarhúsinum. DJ verður Jan Gardar.

## Leygardagin

Leygardagin er skráin á tremur við spennandi og fjølbroyttum tiltøkum fyri alla familjuna. Kl. 14.00 verður stevnan sett. Í ár setir ein av mongu fuglfirðingunum bústiandi í Havn, Petur Simonsen, stevnuna. Eisini spælir Fuglafjarðar Hornorkestur. Sum altíð á varmakeldu, eru framsýningar av ymiskum slag. Umframt framsýningina í Gallarí Ribarhúsi hevur Fuglafjarðar Fornminnisfelag framsýning í Høvdahúsinum og listaframsýning er eisini í fimleikahøllini. Hesar framsýningar hava opið leygar- og sunnudagin. Kl. 17.30 leygardagin verður forvitnisligur dystur á vøllinum. Tá fer vælkenda Berg-liðið - sum er manna við 13 systkjum av Kambsdali - á vøllin.

Mótstøðuliðið er manna við fólki úr Abrahamsenættini, har m.a. Abraham Løkin (fyrr Hansen) er ein.

Kl. 19.00 verður barnatiltak við Angelu, Hannibal, Fjotta og Bobo í nýggja mentanarhúsinum. Atgongumerki á 50,- fáast í forsølu hjá Haraldsen og í FK í Fuglafirði, á Statoilstøðini í Leirvík og Saltangará og á Shellstøðini í Gøtudali. Ikki seld atgongumerki verða seld við dyrnar frá kl. 18.30. Kl. 23.30 verður miðnáttarsamkoma úti á Varmakeldu. Jógvan í Lon Jacobsen heldur røðu. Eisini verður bál og felagssangur. Um miðnáttarleiti verður dansur í ítróttarhøllini á Kambsdali við All That Rain. Í sambandi við dansin koyrir bussur úr Steinatúni kl. 22.30. Áhugað kunnu ringja tel. 21 64 64.

## Sunnudagin

Sunnudagin er eisini nógv á skránni. Kl. 14.00 verður fólkafundur við bókasavnið, har Jákup Pauli Johannesen heldur røðu. Samstundis hevur Føroya Ellisakfør framsýning á tivoliøkinum, har vakrasta akfari verður kosið.

Hendan framsýng er til kl. 16.00. Kl 19.00 sunnukvøldið verður brotssparks- og málmanskapping á vøllinum.

Málverjar verða m.a. Jens Martin Knudsen og Tróndur Vatnhamar. Kappingin er fyri børn og vaksin. Í bólkinum hjá teimum vaksnu kappast málverjarnir eisini um at bjarga so mongum skotum sum møguligt. Besti málverjin og besti brotssparksskjúttin fáa steyp til ognar.

Í sambandi við stevnuna verða lyklar seldir, har høvuðsvinningarnir eru tveir Aprilia skutarar. Tveir av lyklunum passa í lásini, sum hanga við skutararnar. Til ber at royna keyptar lyklar í lásunum á skutarunum, sum standa á tivoliøkinum ímillum kl. 18.00-22.00 sunnukvøldið.

Varmakeldustevnan endar sunnukvøldið við, at JM Band spælir til dans í nýggja mentanarhúsinum. Teir sum manna JM Band eru Jens Marni Hansen, gittar og sang, Ólavur Øster, gittar, Pauli Magnussen, bass, og James Olsen, trummur.

Umframt mongu tiltøkini sum eru nevnd omanfyri, hava fyrireikararnir leiga tveir sumoglímarabúnar úr Danmark. Hesir verða á tivoliøkinum leygardagin og sunnudagin. Kl. 20.30 leygarkvøldið verður sumoglímarakapping á tivoliøkinum. Tá verður dystast um at gerast ársins varmakeldusumoglímari.

Vinnarin fær vinning, sum verður avdúkaður eftir kappingina. Tilmelding fer fram á staðnum beint áðrenn kappingina.

# Várdýpisins songur

**Tiðindaskriv**

Várdýpisins songur er heitið á kórferðini hjá Musikstuderendes Kammerkor úr Aalborg, til Føroyar og Ísland. Kórið varð stovnað í 1995 av tónleikalesandi á universitetinum í Aalborg. Tað hevur síðani verið sera virkið á konsertum og í mentanarlívinum í Aalborg, og aðrastaðni í Danmark. Tey hava arbeitt saman við Det Jyske Kammerkor, Philarmonisk Kor og Aalborg Symfoniorkester. Kórið hevur eisini verið víða um úti í heimi t.d. í Japan og Fraklandi – og á hesum sinni gongur leiðin til Føroyar og Ísland.

Kórið syngur bæði nýggjan og eldri tónleik – serliga norðurlendskan. Hesuferð fara tey millum annað at frumframføra eitt verk fyri kór og saxofon eftir føroyska tónaskaldið Kára Bæk. Í hesum sambandi hava tey kenda svenska sopransaxofonistin Anders Paulsson við.

Kórleiðari í Musikstuderendes Kammerkor er Mogens Dahl, sum er ein av dugnaligastu og virknastu kórleiðarum í Danmark. Hann undirvísir dagliga í kórleiðslu á universitetinum í Aalborg, og á tí Jyska Musikkonservatoriinum, og er listarligur leiðari í tí Jyska operakórinum.

Harumframt er hann nógv umbiðin sum gestakórleiðari á kórstevnum, og hjá heimskendum kórum og ensemblum. Mogens Dahl hevur eisini eitt serligt tilknýti til føroyskan kórtónleik, tí hann hevur tað seinasta árið verið í Føroyum fleiri ferðir, og hildið skeið fyri føroyskum kórleiðarum.

Kórið hevur hildið konsert í Fuglafirði, og týskvøldið 2/6 kl.20.00 verður konsert í Kristianskirkjuni í Klaksvík saman við 17 Sangarum. Mikukvøldið 3/6 kl. 21.00 verður konsert í Vesturkirkjuni í Tórshavn, saman við Tórshavnar Kamarkóri. Hóskvøldið 4/6 kl. 20.00 syngur kórið í kirkjuni í Vestmanna, saman við svenska saxofonistinum Anders Paulsson.

# Konsert í Vesturkirkjuni

*Charlotta Olsen*

Í døgunum 6.- 9. juni hevði musikkskúlin forkunnuga vitjan. Tveir Suzuki-lærarar úr Belgia vóru komnir hendanvegin at hava eitt skeið fyri føroyskum violinnæmingum.

Wilfried Van Gorp og Koen Rens høvdu undirvísing bæði í einatímum og samanspæli. Teir hava báðir eina holla útbúgving innan Suzuki-metoduna og hava eisini verið næmingar hjá S. Suzuki sjálvum!

Ein skrá var løgd fyri hesar dagarnar, og vóru tímar settir av til einatímar og samanspæl soleiðis, at øll sluppu framat hvønn dag. Hóast veðrið var av tí besta møttu næmingarnir hugagóðir upp til venjingarnar. Tann eina dagin var samanspæl-venjingin gjørd uttandura og eydnaðist tað eisini sera væl. Leygardag in var konsert við solistunum og kundu teir her vísa, at teir høvdu fingið nakað burturúr. Leygarkvøldið var farið ein túr við Norðlýsinum til Nólsoyar. Og hóast veðrið var øtlað eitt sindur, var hetta ein avbera góður, stuttligur og »avstressandi« túrur.

Sunnudagin var enda við einari felagskonsert, har allir næmingarnir spældu saman. Byrjað varð við teimum mest royndu og øktist tali so hvørt, sum næmingarnir hildu seg til. Hetta eydnaðist sera væl. Teir vøkru fióltónarnir av »Blinsktra lítla stjørna mín« fyltu Vesturkirkjuna, meðan næmingarnir frá 19 ár og líka niður í 4 ár góvu alt teir høvdu. Sera vakurt! Somuleiðis vóru tvey stykkir »kryddrað« við cellospælið, sum nakrir næmingar á musikkskúlanum spældu.

Henda vitjanin gav næmingunum nógv og eisini lærarnir Sámal Petersen og Annette Nielsen fingu nýggjan íblástur til undirvísingina.

Men hetta hevði neyvan kunna latið seg gjørt uttan góðan stuðul frá Føroya Sparikassa, Føroya Banka, MBM, Tryggingarfelagnum Føroyar, Tórshavnar Musikkskúla og Stephanssons húsið. Somuleiðis høvdu hjúnini Kára og Jakku Heinesen saman við øðrum lagt eina stóra orku í at fáa hetta í lag og leggja til rættis. Og eiga øll hesi eina stóra tøkk uppiborna!

# Hámentanarligir fyrilestrar

Almennir fyrilestrar í Klingruni í Norðurlandahúsinum leygardagin 6. juli 2002 kl. 16.00.

Lars Huldén, professari úr Svøríki, og Jón Karl Helgason, bókmentafrøðingur úr Íslandi, fara at halda fyrilestrar um ávikavist Kalevala og Þrymskviðu.

Lars Huldén hevur saman við soninum Mats gjørt nýggja svenska týðing av tjóðarkvæði finna, Kalevala, sum kom út í 2000. – Fyrilesturin fer at snúgva seg um motivini í Kalevala. Fyrilesturin verður á svenskum.

Jón Karl Helgason hevur vart doktararitgerð við Universitetið í Massachusetts í 1995 um Njáls Saga. – Fyrilesturin hjá honum ber heitið »Gender, Class and Discourse in Þrymskviðja« og verður hildin á enskum.


## Tøkk

Vit vilja hjartaliga takka øllum tykkum, sum sýndu okkum samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Kirstina Klettheyggj**
Sandvík

doyði og varð jarðað.

Tøkk til prest fyri góð og troystarrík orð – bæði heima, í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, gravarar og berarar.
Tøkk til tykkum øll, ið sendu henni blómur, kransar, gávur og heilsanir, og til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.
Tøkk til tykkum, sum tóku tykkum av ervinum, og annars øll, sum hjálptu til við jarðarferðini.

Ein serlig tøkk til tykkum á Suðuroyar Sjúrkahúsi, sum tóku tykkum so væl av henni ta tíðina, meðan hon lá har.

**Elberg, Emmy, Johnhard og Elkin**




# Dúgvan og onnur lítil skip lýst í bann á Tvøroyri

**Tvøroyrar Kommuna hevur nú einaferð enn staðfest, at tað verður tað Dúgvan, sum skal avloysa Smyril, tá ið hann fer í dokk á nýggjárinum, sleppur hon ikki at bryggju á Tvøroyri- men nú er bannið víðkað til eisini at umfata onnur skip**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

**Tvøroyri:** Tvøroyrar Býráð hevur enn einaferð staðfest, at tað fer ikki at góðtaka hvat sum helst, tá ið Smyril aftur fer í dokk.

Smyril skal í dokk í einar tveir mánaðir eftir nýggjar at umvæla stabilisatorarnar, men samstundis er ærtlanin at gera árliga eftirlitið, so at hann ikki aftur skal í dokk næsta vár, sum annars hevur verið vanligt.

Men enn er onki avloysaraskip funnið og sum skilst, er tað meir enn ivingarsamt um tað yvirhøvur fer at eydnast at finna eitt skip á sama støði sum Smyril, tí leigumálið er so stutt. Og tað er eisini fleiri ferðir komið fyri, at tað ikki hevur eydnast at finna hóskandi avloysaraskip, eitt nú hevur Dúgvan verið brúkt og ta eina árið var Claymore leigað.

Tvøroyrar Býráð hevur fyrr gjørt av at vísa sína misnøgd við mátan, sum málið verður handfarið upp á við at nokta at geva Dúgvuni atløgupláss.

## Bannið víðkað

Og nú Smyril aftur skal í dokk, varð málið einaferð enn viðgjørt í býráðnum mánakvøldið.

Har varð samtykt at halda fast um avgerðina at nokta Dúgvuni atløgupláss.

Men har varð samstundis samtykt at víðka bannið til eisini at ufata øll onnur skip, ið vóru minni enn Smyril.

– Eg dugi kki at síggja nakað endamál í at nokta Dúgvuni atløgupláss og so loyva øðrum skipum, sum ikki eru stórt frægari at leggja at, segði borgarstjórin, Finnleif Guttesen.

Og hesum tók Býráðið undir við.

Sostatt samtykti Býráðið mánakvøldið at hvørki Dúgvan, ella nakað annað skip, sum ikki er á líka høgum støði sum Smyril, fáa atløgupláss á Tvøroyri.

Sostatt krevur býráðið, at avloysaraskipið, sum verður sett í sigling ímeðan Smyril er í dokk, skal í hvussu so er ikki vera verri enn Smyril er.

Annars hevur løgmansskrivstovan fyribils sett bannið hjá Tvøroyrar Býráð um at nokta Dúgvuni atløgupláss, úr gildi við teirri grundgeving, at Býráðið hevur ikki heimild at nokta Dúgvuni atløgupláss.

Ein endalig støða skuldi so takast tá ið Løgmansskrivstovan hevði kannað málið gjølligari og var komin til eina endaliga niðurstøðu.

Tann niðurstøðan er ikki komin enn.

Men Tvøroyrar Býráð svaraði skjótt aftur við at leggja ein trolara yvir á samferðsluhavnina og at bjóða Dúgvuni vælkomnari á havnina á norðaru síðu. Men har er ongin ferjulega, so fyri at fáa ferðafólk og bilar í land, má Dúgvan, og onnur skip, sum ikki hava síðuportur, leggja at við hekkuni so at skipið annars stingur út á sjógv og tað kann bara gerast í besta veðri.

Og kemur avgerðin hjá løgmálaráðnum at standa víð, skilst at tað verður eisini mannagongdin, tá ið Smyril fer í dokk eftir nýggjár og um so er, at avloysaraskipið ikki verður góðtikið.

# Høvdu yvirskot á Tvøroyri

**Í fjør hevði Tvøroyrar kommuna eitt yvirskot upp á 2,3 milliónir**

FRAMGONGD
*Áki Bertholdsen*



*Tvøroyrar Býráð kann ikki annað enn fegnast um gongdina. Frá vinstru eru býráðslimirnir Bergur Bærendsen, Dan Nielsen, Heri Mortensen, Pauli Einarsson, Kristin Michelsen, Sverri Midjord og longst til høgru, Óli Debes, býráðsskrivari. Við rygginum ímóti okkum er tað Finnleif Guttesen, borgarstjóri*

**Tvøroyri:** Nú er tað aftur av álvara farið at ganga framá hjá Tvøroyrar Kommunu. Eftir at hon at kalla fór á Ørmundarhús í kreppuni, er nú so stór framgongd at hóma, at longu um trý, fýra ár verður skuldin ikki meir enn ein álíking.

Á býráðfundi mánakvøldið viðgjørdu Býráðið roknskapin fyri í fjør og hann vísti, at gondin í kommununi var betri á øll um økjum, enn væntað varð frammanundan, tí samstundis sum inntøkurnar vóru høgri, vóru útreiðslurnar heldur lægri.

Í fíggjarætlanini, sum løgd varð fyri 2001, varð mett, at kommunan fór at fáa 43,6 milliónir í inntøkum. Tað allarmesta av inntøkunum er sjálvsagt kommunuskattur, men eitt sindur er eisini havnagjald, rentur o.a.

Men tá ið avtornaði var inntøkan 45,5 milliónir, ella 1,9 millión hægri.

Somuleiðis varð tað bíligari at reka kommuna enn mett var. Eftir fíggjarætlanin i skuldi tað kosta 26,2 milliónir at reka kommununa í fjør, men roknskapurin vísir, at í veruleikanum kostaði tað 1,7 millión minni, ella 24,5 milliónir.

Hinvegin gjørdi kommunan heldur ikki ætlar útbyggingarnar, sum hon ætlaði. Í 2001 bygdi kommunan út fyri 1,3 millión, men hon ætlaði at byggja út fyri 1,7 millión – ikki stór tøl hjá eini so stórari kommunu, men eitt prógv um, at kommunan enn er fíggjarliga hart spent.

Tað sæst eisini av, at í 2001 betalti kommunan 10,3 milliónir í avdráttum og 7,1 milliónir í rentu, ella tilsamans 17,4 milliónir í rentum og avdráttum.

Eftir ætlanini skuldi hon betala 16,4 milliónir.

Alt hetta gevur eitt yvirskot í fjør upp á 2,3 milliónir. Skuldi tað hinvegin gingið sum eftir tølunum á fíggjarætlanini, hevði talan verið um eitt undirskot uppá 700.000 krónur.

Øll hesi tølini bera eisini í sær, at á nýggjárinum var skuldin hjá Tvøroyrar Kommunu komin niður á 102,5 milliónir.

Tað svarar til 2,5 álíkningar.

Í nýggju kommunulógini verður lagt upp til, at kommunur skulu ikki skylda meiri enn eina álíkning. Heldur gongdin hjá Tvøroyrar Kommunu fram sum nú, er hetta málið rokkið um nøkur fá ár, tí longu um eini trý ár er skuldin komin niður á hálva aðru álíking, varð upplýst á býráðsfundinum mánakvøldið.

Býráðið samtykti annars einmælt at góðtaka roknskapin fyri í fjør.

# Keyptu bedingina fyri 50.000 krónur

**Tvøroyrar Kommuna hevur nú selt bedingina. Kommunan fekk bara eitt boð upp á hana. Ein møguleiki er, at skipasmiðja og beding aftur verður sett á stovn**

KEYP OG SØLA
*Áki Bertholdsen*



*Hesi seinastu árini er bedingin á Tvøroyri fallin í órøkt og tað er synd at siga, at hon hevur verið eitt prýði fyri Tvøroyri. Men nú hevur kommunan selt hana og keypararnir, Bergur Bærendsen og Knútur Nygaard, ætla at seta okkurt virksemi ígongd*

**Tvøroyri:** Tvøroyrar Kommuna hevur nú loksins selt bedingina .

Tað er eitt felag undir stovning við Bergi Bærendsen og Knúti Nygaard, sum nú hevur keypt bedingina frá kommununi, sum annars hevur átt hana, síðani hon fór á húsagang fyri nøkrum árum síðani.

Síðani hon fór á húsagang og kommunan yvirtók hana, er hon bara forfallin meiri og meir og fyrr í ár samtykti býráðið sostatt at lýsa hana til sølu.

Men nú frestin at lata tilboð inn var úti, hevði kommunan bara bara tað eina boðið upp á bedingina.

Og á fundi mánakvøldið samtykti býráðið at taka av tilboðnum frá Bergi Bærendsen og Knúti Nygaard uppá 50.000 krónur.

Finnleif Guttesen, borgarstjóri, ásannar, at hetta er ikki nógv. Men hann er kortini væl nøgdur við at kommunan er sloppin av við hana, tí nú eru hóast alt útlit til at fáa okkurt vinnuligt virksemi í gongd á bedingini.

– Hjá kommununi var bedingin bara ein útreiðsla, samstundis sum bygningarnir og alt økið sum tað er, eru fallin í órøkt, og hetta var einasta tilboð sum var, so tað órógvar meg als ikki at talan ikki var um tann stóra søluprísin, sigur hann.

## Virksemið ígongd

Bergur Bærendsen sigur, at sjálvsagt er ætlanin at fáa okkurt virksemi ígongd aftur á bedingini.

Men nær tað verður, og hvat slag av virksemi, talan verður um, hava teir ikki gjørt sær heilt greitt enn.

– Hetta er líka nógv ein íløga í framtíðina, sum nakað annað. Men eyðvitað verður okkurt sett ígongd, tí sum økið liggur nú, er tað bara ein byrða fyri okkum, sigur hann.

Men hann sigur, at ein møguleiki er, at talan verður um at fara aftur á slóðina og at fara undir okkurt slag av skipasmiðju og bedingsarbeiði, so at virksemið sum var, kann takast uppaftur, um enn í øðrum líki.

– Tíverri er bedingsvognurin burtur, so tað verður ein stór íløga, sigur hann.

Hann vísir eisini á, at talan verður neyvan um vanligt skipasmiðju– og bedingsarbeiði, tí tað er nóg mikið av tí í landinum frammanundan og at fara í beinleiðis kapping við tær skipasmiðjur sum eru, sær hann onki endamál í.

Men hann sigur, at bæði Knútur Nygaard og virkið hjá honum sjálvum, Bærendsen Teknik, fáast við ymsar tænastur til skip.

– Hevði tað borið til at funnið okkurt økið, har vit kundu farið undir okkurt slag av skipasmiðjuvirksemi, sum stuðlaði uppundir tað, vit gera frammanundan og har vit eru sterkir – uttan beinleiðis at fara í kapping við tær skipasmiðjur sum eru, kundi tað verið ein møguleiki. Men enn er ov tíðlig at siga nakað, sigur Bergur Bærendsen.